**Semja**

**millum**

**Maskinmeistarafelagið og Fíggjarmálaráðið**

**um maskinmeistarar á landi**

**Sáttmálaskeið**
Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober í 2022 til 30. september í 2025.

**Broytingar í sáttmálanum**

Hækkingar í løn og eftirløn:

- Lønin hækkar 3,8% % tann 1. oktober 2022
- Lønin hækkar 4,20 % tann 1. oktober 2023
- Lønin hækkar 4,75 % tann 1. oktober 2024

**Viðbøtur § 4.**

**Stk. 1 Leiðaraviðbót og viðbót fyri serliga ábyrgd:**

Verður maskinmeistari settur í starv, sum arbeiðsliga, fyrisitingarliga ella á annan hátt hevur eina slíka serstøðu, at tað ikki er umfatað av teimum vanligu fortreytum fyri niðanfyri ásettu lønum v.m., verður veitt honum eina mánaðarliga viðbót svarandi til eina av upphæddunum í hjálagda ískoyti til sáttmálan. Viðbøtur og møguligar aðrar sømdir verða veittar eftir avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið.
Hesar viðbøtur eru eftirlønargevandi.

Henda broyting er galdandi frá 1. oktober 2024.

**Stk. 2. Yvirtíðarviðbót:**

Seravtalur kunnu gerast um viðbót fyri arbeiði uttan fyri vanliga arbeiðstíð og fyri yvirtíð.

Samsvar skal vera millum tað upphædd sum verður veitt í viðbót og avtalaða miðal meirarbeiðstíð / yvirtíð.

**Stk. 3.**

Avtalur um viðbót skulu vera skjalfestar og eru partur av setanini. Nevndu viðbøtur hækka til eina og hvørja tíð við sama prosenti sum lønirnar.

**Protokolat**

Partarnir eru samdir um í sáttmálaskeiðinum at viðgera møguligar broytingar av lønartalvuni og skipanini við viðbótum eftir § 4. Hetta so at bæði lønartalva og viðbøtur vera einfaldari. Eisini skal rætturin til úrtíðarløn eftir § 5 stk. 3 viðgerðast.

*Tinganes 19. juli 2024*

**Maskinmeistarafelagið**

Arnfinnur Bech, formaður

**Fíggjarmálaráðið**

Ruth Vang, Landsstýriskvinna

Jan Mortensen, lønarstjóri